Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Magnus Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Starvsnormeringar hjá námsfrøðingum í serflokkum í fólkaskúlanum

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv tað vildi kostað mánaðarliga at sett námsfrøðingar í føstum starvi, sum arbeiða í serlokkum í fólkaskúlanum, í fult starv við setanarbroti á 1,0?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rímiligt, at fast settir námsfrøðingar í serflokkum í fólkaskúlanum hava lægri setanarbrot samanborið við líknandi námsfrøðingar á serbreytini á miðnámsskúlaøkinum?
3. Kann landsstýrismaðurin greiða frá og grundgeva fyri, hví setanarbrotið hjá námsfrøðingum í serflokkum í fólkaskúlanum er væl lægri enn setanarbrotið hjá námsfrøðingum á serbreytini á miðnámsskúlaøkinum, tá talan er um serbreytir í báðum førum?
4. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa viðurskiftini soleiðis, at námsfrøðingar í serflokkum í fólkaskúlanum verða settir í fult starv við einum setanarbroti á 1,0 og fáa eins setanarviðurskifti, sum námsfrøðingarnir, sum virka á serbreytini á miðnámsskúlaøkinum?

Viðmerkingar:

Tað eru fleiri sertilboð/serflokkar skipað í Føroyum. Ymiskt er, hvussu hesir serflokkar eru í støddog skipan. Felags fyri øll tilboðini er, at tey eru skipað soleiðis, at ein skúli umsitur serflokkin og tekur tískil næmingar inn frá einum ella fleiri skúlum í nærumhvørvinum.

Í serflokkum starvast lærarar og námsfrøðingar. Flestu lærararnir í føstum starvi eru settir við setanarbroti 1,0, meðan flestu námsfrøðingarnir í føstum starvi, hóast sama tímatal saman við næmingunum, eru settir við setanarbroti 0,85 ella lægri.

Tá talan er um at menna næmingar í serflokkum, arbeiða námsfrøðingar og lærarar í samráði og samstarvi í sjálvstýrandi toymi. Høvuðsuppgávan er at ráðleggja, gjøgnumføra og eftirmeta skúladagin hjá næmingunum. Arbeitt verður út frá læruætlan og menningarætlan hjá einstaklinginum. Í slíkum arbeiði er avgerandi, at menningin er ein heildarmenning, har barnið hvílir trygt í, at øll starvsfólkini hjálpa til, har tørvurin er.

Tað kann tykjast øvut, at normeringin ikki er tann sama fyri lærarar og námsfrøðingar í serflokkum í fólkaskúlanum, tá normeringin fyri hesar starvsbólkar er tann sama á serbreytini á miðnámsskúlaøkinum.

Tí verður hesin spurningurin settur.

Á Løgtingi, 8. januar 2025

Magnus Rasmussen